# Positivt at fáa blaðið í oynna



*Tordur Niclasen, borgarstjóri í Eiðis Kommunu, metir tað at vera positivt, at Sosialurin letur upp í Eysturoy*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Borgarstjórin i Eiðis Kommunu heldur tað vera positivt, at Sosialurin letur upp redaktión í Eysturoynni. Á tann hátt fer blaðið at koma nærri lesarunum, metir hann**

SOSIALURIN Í EYSTUROY
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Tað fer ivaleyst at skapa meira áhuga fyri blaðnum, tá fólk sær, at farið verður út um høvuðsstaðarøkið, sigur Tordur Niclasen, borgarstjóri í Eiðis Kommunu.

Eisini í norðara enda av Eysturoy fegnast kommunalpolitikarar um, at Sosialurin letur upp eina Eysturoyarredaktión.

– Tað skal undra meg, um vit ikki fara at merkja, at blaðið er komið nærri okkum, sigur Tordur Niclasen. Tað býr nógv fólk í Eysturoynni, og tey fara at kenna tað meira viðkomandi, tá tey vita, at ein partur av blaðnum heldur til í teirra egna umhvørvi, væntar hann.

So løgið tað ljóðar, sigur hann, so er tað ikki fyrr enn nú, blaðið flytir í Eysturoynna, at ein veruliga leggur merki til, at tað í grundini hevur manglað. Fólk hava mestsum vant seg við, at tað bara hevur verið í høvuðsstaðarumráðnum, at alt blaðvirksemið hevur verið.

Tá fólk síggja, at blaðið hevur ómakað sær at koma til teirra, fara tey at kenna tað meira viðkomandi. Tað átti so aftur at gjørt, at tey ivaleyst fara at taka tað til sín, metir borgarstjórin á Eiði.

– At eitt blað flytir part av virkseminum higar, merkir samstundis, at sjónarringurin verður víðkaður. Og tað eigur at skapa áhuga í fólkinum fyri tí, sum blaðið fer at fáast við, heldur hann.



# Umráðandi við sterkum vinnulívi



*Skúlin er liðugur, og ítróttarhøllin skal gerast liðug í ár. Síðan skulu eini 20 grundstykki fáast til vega vestan fyri ítróttarhøllina, sigur borgarstjórin í Eiðis kommunu*

**Tað er umráðandi við sterkum vinnulívi, sum kann bera restina av virkseminum í kommununi uppi, sigur borgarstjórin í Eiðis Kommunu**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Tað er umráðandi framhaldandi at skapa góðar karmar hjá vinnulívinum at virka í, sigur Tordur Niclasen, borgarstjóri í Eiðis Kommunu. Tí tað er jú frá hesi somu vinnu, at inntøkurnar hjá kommununi stava, sigur hann.

Vinnan hevur givið væl í kommunukassan á Eiði seinnu árini, letur borgarstjórin at.

Tríggjar bygdir eru í Eiðis Kommunu. Eiði, við Ljósá og Svínáir. Men tað er á Eiði tær stóru utbyggingarnar verða, og tað er eisini her, komandi útstykkingin í kommununi verður gjørd, sigur borgarstjórin. 24 grundstykki er talan um.

Um tær báðar smærru bygdirnar sigur hann, at har verða eisini ávís kommunal arbeiði gjørd í summar.

Við Ljósá verður farið undir at breiðka vegin oman til lendingina, tí hann er ikki nóg tryggur at ferðast eftir, sum er.

Í Svínáum treingir til at verða bøtt upp á kloakkskipanina, og tað arbeiðið verður farið undir nakað skjótt, sigur Tordur Niclasen.

## Fíggjarkarmur

Eiðis Kommuna hevur lagt fíggjarkarmin fyri árið í ár. Roknað verður við sløkum 14 milliónum í vanligari skattainntøku í ár, sigur borgarstjórin. Umframt kemur so partafelagsskattur og annað, so samlaða skattainntøkan er sett til at verða 15,8 milliónir krónur.

Íløgukarmurin hjá Eiðis Kommunu er trengri, enn ynskiligt kundi verið. Hann er settur til 2,5 milliónir krónur.

Men nakað fæst so gjørt fyri tann peningin kortini. Eitt nú skal fyllast út Suðuri undir Gerði, har nýggja virkið, sum skal taka í móti sjúkum alislógvi, skal liggja.

Umstøðurnar á havnarlagnum skulu eisini betrast í aðrar mátar, sigur borgarstjórin.

Umstøðurnar á nýggja havnarlagnum innan fyri syðra grótkastið hava ikki verið nóg góðar. Myrkt hevur verið framvið, og atløgupláss mangla til smærru bátarnar.

Ljós verða nú sett upp, so tryggari gerst at ferðast har. Men hvussu gerast skal við bátaplássini er enn ikki avgjørt. Tankar hava verið frammi um ymsar loysnir, men eingin avgerð er tikin.

Hinvegin er greitt, at verandi flótibrúgv skal styrkjast, tí mett verður ikki, at hon klárar trýstið, sum er á henni, tá allir bátarnir, sum rógva út um várið, liggja við hana.

– Alt kann tó ikki gerast í ár. Tí forðar íløgukarmurin fyri, sigur borgarstjórin.

Men ytri á havnarlagnum, uttan fyri flakavirkið, stendur ein tóm høll, sum bygdarráðið fegið vil hava virksemi í. Arbeitt verður við ymsum møguleikum, sigur Tordur Niclasen, sum vónar, at okkurt fer at koma í gongd har nakað skjótt.

Oman fyri nýggja havnarlagið, Uppi á Grind, er høgt berg, har fólk regluliga gongur. Trygdin har hevur ikki verið nóg góð, men tað verður bøtt munandi um tað nú. Har verður hegnað av allan vegin fram við klettinum.

Av øðrum trygdartiltøkum nevnir Tordur Niclasen vegbungur, sum lagdar eru í vegirnar fyri at økja ferðslutrygdina á Eiði.

## Skúli og útstykking

Skúlaútbyggingin, sum gjørd varð saman við ítróttarhøllini, er við at vera komin undir land, sigur Tordur Niclasen.

Umleið 700 fermetrar eru bygdir afturat. Talan er um ymsar serstovur, sum kravdar eru eftir nýggju skúlalógini. Eisini er ein aula gjørd í nyggja bygninginum, sigur hann.

Arbeiðið upp á ítróttarhøllina hevur ligið stilt eina tíð, men verður nú tikið uppaftur. Har manglar ikki tað heilt stóra soleiðis, greiðir borgarstjórin frá. Settar eru tvær milliónir av til høllina í ár, og Tordur Niclasen roknar við, at hon verður liðug í hesum árinum. Tað fer at hjálpa væl upp á trivnaðin í bygdini, heldur hann.

Annars er ymisk at taka til í frítíðini. Eiðis Bóltfelag hevur virkið felagslív. Kristiligar samkomur hava ymiskt at fara til, eins og kvøldskúli eisini er.

– Og so eru tað vit gomlu, »motionistarnir«, sum brúka fimleikarhøllina í skúlanum til eitt nú badminton og tílíkt, greiðir borgarstjórin á Eiði frá.

Eisini á Eiði er eftirspurningur eftir grundstykkjum, og kommunan hevur eisini ætlanir tann vegin.

Uppi á Kollshjøllum, oman fyri Hotel Eiði, eru fýra stykki framvegis tøk. Men nýggj útstykking við 20 grundstykkjum er ávegis Úti á Horni frá svinginum beint uttan fyri ítróttarhøllina og út gjøgnum Gerði.

Hóast fleiri fyrispurningar og eisini onkur beinleiðis umsókn er komin, er eingin avgerð tikin um, nær spakin verður settur í, sigur Tordur Niclasen, borgarstjóri.

– Samráðinganar við eigararnar skulu vera fyrst, og tær hava ikki verið enn, sigur hann.



# Býarplanur er á veg á Strondum

*Eivind Jacobsen, borgarstjóri í Sjóvar Kommunu, hevur vón um, at einaferð verður undirsjóvarrtunnil undir Skálfirði millum Strendur og Saltnes*



**Sjóvar Kommuna er við at stinga framtíðar býarætlan fyri Strendur út í kortið. Pláss skal vera fyri bæði barnagarði, ítróttarøki og eldrabýli, sigur borgarstjórin**

KOMMUNUMÁL
*Edvard Joensen*

**Strondum:** Nýggj byggiætlan verður í hesum døgm gjørd á Strondum. Hon verður væntandi liðug fyri summarfrítíðina, sigur Eivind Jacobsen, borgarstjóri í Sjóvar Kommunu.

Alt skal takast við, sigur borgarstjórin. Frá barnagarðinum til hin endan, har eldrabýlið er. Og so alt tað, sum liggur í millum eisini. Bæði bústaður, frítíðarøki og vinnuøki.

Hóast endalig støða ikki er tikin til, hvar útstykking skal vera, er greitt, at tað økið við Bygdarhúsið, sum í síni tíð varð slættað til ítróttarøki, eisini í komandi býarætlan skal brúkast til ítróttar- og frítíðarendamál.

Endaliga er heldur ikki avgjørt, hvar barnagarðurin skal vera, men so mikið er hann komin áleiðis, at avtala er gjørd um at tekna hann, sigur borgarstjórin.

Útstykking er neyðug, tí bert nøkur fá grundstykki eru eftir, og áhugin fyri at byggja á Strondum er vaksandi. So tað verður eitt tað fyrsta, sum gjørt verður. Eisini eldraøkið skal nakað gerast við, sigur Eivind Jacobsen.

Ídnaðarøki vil Sjóvan Kommuna eisini hava. Tað er ætlanin at fáa innasta økið á Raktanga, tað, sum liggur næst vegum, til ídnaðarøki, sigur hann.

– Trupulleikin har úti er bara tann, at økið er friðað, so har gerst einki, sum er. Men vit ætla at fáa friðingina broytta, sigur Eivind Jacobsen.

Hvør nágreiniliga grundin til friðingina er, veit borgarstjórin ikki at siga. Har er eitt fiskastykki, sigur hann. Og so stendur eisini, at umráðið:

».....er af rekreativ værdi.«

Hvat tað heilt nágreiniiga skal merkja, duga tey ikki at siga í dag, sigur Eivind Jacobsen, sum ongan iva letur vera um, at hann fegin vil hava friðingina broytta.

Friðingin er eisini í vegin fyri útskifting, vísir hann á. Hóast økið har úti er umleið 20 prosent av samlaða bønum á Strondum, vil eingin hava tað í eini útstykking. Júst tí tað er friðað.

Borgarstjórin í Sjóvar Kommunu hevur eisini ætlanir longri fram í tíðina. Nógv longri fram. Hann droymir um ein undirsjóvartunnil millum Strendur og Saltnes.

— Tað ber væl til, sigur hann. Tað eru bara 800 metrar millum Langanes og Saltnes, so tað hindrar ikki. Men tað hevði gjørt tað nógv liviligari her við fjørðin, vísir hann á. Samstarv av ymsum slagi hevði verið meira, og fólk hevði havt nógv lættari at ferðast til arbeiðis allastaðni kring fjørðin.

Tað er ein langsiktað ætlan, vísir Eivind Jacobsen á. Tí fyrst skal undirsjóvartunnil gerast til Norðoyar. Síðan skal tunnil gerast í Suðuroy millum Hov og Øravík. Ein skal gerast úr Gøtudali, sum skal koma út aftur Millum Fjarða, áðrenn vit eiga tørn, ásannar Eivind Jacobsen.

– Men tað er realistiskt at hugsa so, heldur hann. Bara arbeitt verður langsiktað, og málið regluliga verður tikið upp, fara fólk at venja seg við tankan og skilja, at tað ber til og at tað er skil í tí, er borgarstjórin í Sjóvar Kommunu ivaleysur í.



# Umráðandi við tøttum sambandi

*–Tá blaðið kemur út í ymsu økini, veksur áhugin hjá vanliga lesaranum eisini, tí tíðindaflutningurin verður breiðari. Fleiri lesarar geva fleiri lýsarar, og á tann hátt vinnur blaðið íløgurnar aftur, sigur borgarstjórin í Sjóvar Kommunu, Eivind Jacobsen á Strondum*
*Mynd: Edvard Joensen*



**Tað er skilagott av Sosialinum at lata upp redaktión í Eysturoynni. Tað fer at gagna bæði blaðnum og vinnu- og handilslívinum í oynni, heldur borgarstjórin í Sjóvar Kommunu**

SOSIALURIN Í EYSTUROY
*Edvard Joensen*

**Strondum:** Tað verður vinningur fyri bæði Eysturoynna og Sosialin, at redaktión verður latin upp í Eysturoy, heldur borgarstjórin í Sjóvar Kommunu. Tættari samband millum blað og lesara kann bara gagna báðum pørtum, sigur hann.

– Tað er greitt, at nærri tíðindamaðurin er okkum, betri verða vit lýst. Skjótari tað er at koma til tíðindini, skjótari verða tey skrivað, sigur Eivind Jacobsen, borgarstjóri í Sjóvar Kommunu, sum býður Sosialinum vælkomnum, nú hann flytur inn í Eysturoynna.

Vit hava mangan hug at halda, at øll tíðindi koma úr Havn. Tað er partvís eisini rætt, sigur Eivind Jacobsen, sum ikki ivast í, at einfalda grundin er, at har eru tíðindastovurnar, og haðani verður arbeitt.

Tá eitt blað skal skrivast, skal tað gerast skjótt, vísir hann á. Helst upp á ein fyrrapart. Og tá er skjótast at fara eftir tí, sum næst er. Tað vil í fleiri førum siga í og rundan um Havnina.

Nú tíðindasktovan letur uppí Eysturoynni, fer at vera líka skjótt at koma til tey tíðindi, sum eru at fáa her, vísir hann á, og so verða tey eisini skrivað upp á hendan sama fyrrapartin og prentað seinnapartin. Soleiðis koma eisini tey lokalu tíðindini í pressuna.

Vit síggja heilt greitt, at har sum blaðfólkini dagliga eru, tykjast flestu tíðindini vera at frætta, sigur borgarstjórin í Sjóvar Kommunu. Tað kemur so aftur umráðnum til góðar. Tí hvørja ferð eitt stað verður nevnt í tíðindaflutningi, minnast fólk til, at tað er har. Samstundis koma tey eisini í tankar um, at einhvør fyritøka, sum selur tað ella tað, eisini er har, og kanska skuldu vit roynt at fingið tað, vit manglaðu í seinastu viku, haðani.

Upplýsingin um økið verður betri, og fólk fáa eina breiðari heildarmynd. Uppfatanin av, at alt hendir á einum stað, fer at broytast, meira tíðindini verða spjadd úr landinum, heldur borgarstjórin í Sjóvar Kommunu.

Blaðnum kemur tað til góðar á tann hátt, at verður onkur lokalur nevndur, er heilt víst, at fleiri fólk fara at keypa blaðið fyri at síggja, hvat nú verður skrivað.

– Tað eru í grundini tær smáu søgurnar, sum bera tíðindaflutningin, sigur Eivind Jacobsen. Tí stórtíðindini eru bara ein partur av samlaða tíðindaflutninginum, og tey eru í grundini rættiliga sjáldsom, tá alt kemur til alt.